# Reinsa og smelta tálg

**At nýta:** Knívar, skeribretti, íløt til skornu tálgina, hvirlur/kjøtmaskinur, grýtur og okkurt at røra runt við, toystykki at síla ígjøgnum og størri sílu, sum kann standa sjálv, ílat at síla í, tómar mjólkapakkar til síladu tálgina.

**Framferðarháttur:** Hakka tálgina sundur í smærri petti. Kjøt og aðrar óreinskur verða skornar burtur.

Lat tálgina ígjøgnum kjøtmaskinu ella hvirlu.

Lat tálg í grýtuna og koyr somikið av vatnið í at tálgin er undir. Tendra undir grýtuni, lat prutla spakuliga, meðan rørt verður í av og á. Tað tekur uml. 1 tíma at smelta 4-5 kg av tálg. Kóka við loki á.

Stoyt tað heitu smeltaðu tálgina ígjøgnum eitt toystykki, sum er lagt í eina sílu. Tak toystykki saman um og kroyst vætuna úr.

Stoyt tálgina í tómar mjólkapakkar og lat tað kølna, uttan at røra við tað. Tálgin verður nú skild í tvey løg: ovara lagið er tálg og niðara er vatn.

Dagin eftir er tálgin heilt kølnað, og vit skera mjólkapakkan upp og taka tálgina frá botnfallinum. Reinsa tað tunna gráa lagið á undirsíðuni á tálgini burtur.

Tann reinsaða tálgin kann goymast í frystiboks í uml. 6 mánaðir ella uml. 2 mánaðir í køliskápi, um undirsíðan er væl reinsað.

# Ljós

**At nýta:** grýta, kanna at stoyta smeltaða tálg við, glaskrukkur, koppar ella annað at gera ljós í, veikar (tjúkkir og smalir), lím-pistól, grillpinnar at stýra og halda veikinum uppi, søkk til smalar veikir t.d. møttrikkar/eittkrónur.

**Framferðarháttur:** Heft veikir í krukkur. Tjúkkir veikir verða heftir beint niður á botnin, meðan smalir veikir nýta eittkrónu ella møttrik at tyngja niður við. Límpistól og grillpinnar verða nýttir sum amboð.

Smelta tálgina við lágum hita í grýtu. Tá tálgin er smeltað, verður hon oyst upp í krukkurnar við veiki og sett á kølið stað at stadna.

# Fuglamatur

**At nýta:** ymisk fræ, formar og bond

**Framferðarháttur:** Fyri at gera fuglamat, skal tálgin ikki smeltast, men bara hitast eitt sindur, so at hon ber til at forma. Síðan verður upphitaða tálgin blandað við ymisk fræ og gjørd til bóltar ella latin í formar, og eitt band lagt í soleiðis, at tað kann heingjast í trø.

# Sápa – vit hava tvær uppskriftir

**At nýta:** vekt, stál ella plastikkílat, plastskeið, grýtu, feitt (mandelolju ella Palmin), kaustiksodu, hondmiksara, formar til sápur, lukt vm. at lata í sápur, handskar og trygdarbrillur, íløt at leggja sápur í at hava heim við.

**Framferðarháttur:**

Stilla alt klárt, sum tú skal brúka. Viga tálg og feitt (Palmin/mandelolju).

| Uppskrift 1 | Uppskrift 2 |
|---|---|
| 450 g tálg | 400 g tálg |
| 100 g mandelolja (t.d. frá Urtegarden) | 200 g kokos (Palmin) |
| 90 g lútur (NaOH – natriumhydroxid/ kaustiksoda) | 92 g lútur (NaOH – natriumhydroxid/ kaustiksoda) |
| 210 g vatn | 200 ml vatn |

Viga lútin, brúka stál ella plastikkíløt. Brúka kalt vatn úr krananum. Lúturin kann kóka yvir, um tú brúkar heitt vatn. Stoyt varliga lútin í vatnið, meðan rørt verður í við eini plastikskeið. Ver ógvuliga varin við lútinum, tað gevur brandsár, um tú fært hann á húðina.

Smelta tað vigaða feittið í eini grýtu og lat palmin/mandelolju í. Tak grýtuna av hitanum, tá alt er smeltað.

Koyr tað smeltaða feittið í eina skál og ger hondmiksaran kláran. Týdningarmikið er, at lúturin og feittið verður blandað saman beinanvegin, meðan tað er heitt. Set miksaran á lægstu ferð. Stoyt lútin í feittið í eini tunnari strálu. Tá allur lúturin er komin í, verður ferðin sett upp á hægstu ferð.

Minst til tá ið tú pískar, ver í einum heitum rúmi, so kólnar lúturin ikki so skjótt, og tú fært pH-virðið longur niður. Blandingin verður pískað í uml. 15 min. Fyri at vita, um blandingin er klár, ber til at taka við eini skeið eftir blandingini, og tað er ein rond, sum situr eftir á skeiðini í nøkur sekund.

Nú ber til at lata sápu í formar. Enn er neyðugt at vera í handskum og trygdarbrillum, tí sápan enn er esjandi. Bara hugflogið setur mark fyri, hvat tú kanst lata í ymsu formarnar. Nøkur dømi: eteriskar oljur (Essential oil), sum geva lukt, sand at skrubba við, kaffi at skrubba við, havragrýn, turkaðar blómur t.d. lavendelblómur, morgunfrúu, myntu, leir, kamillute o.s.fr.

Tá sápuformarnir eru lidnir, verða teir lagdir á eitt kalt stað til teir stadna. Tak sápurnar úr formunum, meðan tú ert í handskum.

Tað, sum er hent millum tálgina og lútin, er ein kemisk prosess. Feittsýrurnar í tálgini reagera við lútin og gera eitt salt, sum er sápan. Tað er neyðugt at sápan kann liggja og búnast soleiðis, at allur lúturin er reageraður, og at hon tí hevur fingið eitt meiri húðvinarligt pH. Tí skalt tú ikki nerta við sápurnar, fyrr enn tær eru búnaðar í 4-6 vikur.